# SERSTØK BYGGISAMTYKT MILLUM JÓANNESAR PATURSSONAR GØTU OG LANDAVEGIN

SB_Tórshavn_undirGráasteini_2026_2026

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á fylgiskjali 1, og fevnir um matr. nr. 854, 856, 857, 853i, 853k, 853l, 853m, 853n, 853o, 853p, 853q, 853r, 853s, 853t, 853u, 853v, 853x, 855a, 855b, 858a, 858aa, 858ab, 858ac, 858ad, 858æ, 858c, 858ø, 858p, 858q, 858r, 858s, 858t, 858u, 858v, 858x, 858y, 858z, 859b, 859e, 860a, 860d, 860e, og 861c, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaðabygging í økinum.

Stk. 2. Økið liggur í umráðisparti A1, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlaður stakhúsabygging

Stk. 3. Sambært kap. II, § 5, stk. 10 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt fyri eitt náttúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Til ber eisini at hava handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til.

Stk. 2. Økið verður býtt í økini A, B, C og D sambært fylgiskjali 2.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Øki A

1. Økið verður lagt til stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Til ber eisini at hava handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til.
2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum og raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
3. Framsíður á bygningum móti Fríðriks Petersens gøtu og Landavegnum, skulu liggja í byggilinju sum víst á fylgiskjali 2.
4. Um 10 ella fleiri íbúðir eru á eini ogn, skal uppihaldsrúm gerast til íbúgvarnar, og skal hetta vera minst 4 $m^2$ fyri hvørja íbúð.

UPPSKOT

Stk. 2. Øki B
1. Økið verður lagt til raðhús.

Stk. 3. Øki C
1. Økið verður lagt til raðhús.

Stk. 4. Øki D
1. Økið verður lagt til íbúðir.
2. Økið skal skipast sambært vegleiðandi fylgiskjali 3. Íbúðarbygging og parkeringspláss skulu skipast sum víst á fylgiskjali 3. Á restini av økinum kann bygging so sum svalar, spæliplass, goymslurúm, lyftir og tílíkt skipast.
3. Mest loyvda byggistig er 0,45.
4. Mest loyvda nýtslustig er 1,30.
5. Byggingin skal hava mønutekju.
6. Mest loyvda hædd til hægsta punkt við útvegg er 9,0 m.
7. Mest loyvda hædd til hægsta punkt á mønu er 11,5 m.
8. Uppihaldsrúm skal gerast til íbúgvar í økinum, og skal hetta vera minst 4 $m^2$ fyri hvørja íbúð.
9. Minst 1 parkeringspláss skal gerast fyri hvørja búeind.

**§5. VEGIR**

Stk. 1. Verandi farðleiðir gjøgnum økið skulu tryggjast, sí vegleiðandi farleiðir á fylgiskjali 2.

Stk. 2. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**§6. ÚTSJÓND**

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggimyndugleikan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

**§7. BYGGING IÐ ER**

Stk. 1. Hendan byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

**§8. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR**

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

**§9. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI**

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

UPPSKOT

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

UPPSKOT



**Tórshavnar Kommuna**

**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt millum Jóannesar Paturssonar Gøtu og Landavegin | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1500 | | | | |
| **Dagur** | 03.06.2026 | **Journal** | 25/10368 | **Teknað** | RVH |




- - - Økið samtyktarinnar
Øki A
Øki B
Øki C
Øki D
Farleið
Byggilinja

## Tórshavnar Kommuna

**Býarskipanardeildin**

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt millum Jóannesar Paturssonargøtu og Landavegin |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 2 |
| **Mát** | 1:1000 |

| **Dagur** | 03.06.2026 | **Journal** | 25/10368 | **Teknað** | RVH |
|---|---|---|---|---|---|




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt millum Jóannesar Paturssonargøtu og Landavegin | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 3 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 09.06.2026 | **Journal** | 25/10368 | **Teknað** | RVH |